Orðaskifti:

# Kunning til objektivan serfrøðing

Tað tykist sera undarligt at sokallaði »objektivi« sakkunnleikin í mongum føri »gloymir« størsta bólkin av føroyingum, nevniliga sambandsveingin.

Tað er einki at dylja, at hesin vongur er styrktur nógv eftir valið, hóast loysingarvongurin hevur játta sær sjálvum tíggjutals milliónir krónur, at propagandera fyri sínum boðskapi, bæði uttan og innanlands. Ein boðskap, ið beinanvegin skramblar saman, um ein objektivur serfrøðingur, journalistur ella vanligur føroyingur setir ein ella fleiri kritiskar spurningar.

Tíverri síggja vit alt ov lítið av hesum spurningum, ikki minst frá SVF, ið fyri kortum vildi »halda fram við seriøsum djúptøknum journalistikki - **sum vanligt!**«. Hava teir stilla ein einasta kritiskan djúptøknan spurning viðvíkjandi livimøguleikum føroyinga í einum fullveldi kontra ríkisfelagsskapi? Eg havi ikki hoyrt slíkan ella líknandi spurningar - tíverri. Tí tykist djúptøkni journalistikkurin hjá nøkrum mest at líkjast journalistikki handan Jarntjaldi fyri nøkrum árum síðani, har journalistar runnu ørindir fyri ávísa politiska hugsjón.

### Kunning til J Mørkøre:

Í øllum lítilætni vil eg kunna um, at tygum tykjast at gloyma (helst »objektivt serfrøðisliga«), at tað er ein flokkur, ið eitur Sambandsflokkurin.

Hesin flokkur var stovnaður í 1906-7, og hevur altíð havt stóra undirtøku ímillum veljarnar. Til dømis var hann størsti flokkur á Tingi frá 1994 til 1998.

- Hetta tíðarskeið hevði hann løgmann.
- Undir leiðslu av hesum Sambandsflokki fór aftur at ganga betri í Føroyum, eftir at loysingarflokkar høvdu rent Føroyar á húsagang. Stóra fíggjarlógar undirskots evjan var til eitt munastórt yvirskot
- Fíggjarliga fór aftur at ganga betur í Føroyum.
- Meðan hesin flokkur sat við ræði, lækkaði skattatrýst føroyinga við 500 milliónum krónum, og var ikki heimsins hægsta longur. (tíverri er hendan skattalætta gongd nú steðgað eftir at Sambandsflokkurin fór úr samgongu)
- **Nú metir Sambandsflokkurin, at tíðin er komin, at gera ríkisrættarligar broytingar.**
- Hann vil fremja broytingar, men vil ikki úr ríkisfelagsskapinum.
- Hann vil hava eitt greitt býti av, hvat er føroyskt, hvat er danskt og hvat er felags.
- Uppskot okkara verður av Jóanis Eidesgaard sagt at liggja tætt teirra uppskotið.
- Tað er tí sera sannlíkt, at Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin kunnu samstarva um eina fyri føroyingin góða ríkisrættarliga loysn, ið ikki fremur ein »búskaparligan skelk ella hóttafall«, sum fullveldissamgongan sjálv óttast fyri, eins og flestu føroyingar.
- Flokkurin er sambært seinastu veljarakanning størsti flokkur á tingi.
- Hví hevur hann í hugaheimi »objektiva serfrøðinga« somu stødd sum flokkar, ið ikki eru á tingi? Er tað tilætlað manipulatión ella hevur »serfrøðinga hugsanin og ráðgevingin« eina politiska slagsíðu, ið avspeglar egnu hugsjón, heldur enn at vera objektiv? Um so er, tykist ikki rætt at pynta seg við objektiva serfrøðingaheitinum, ið eigur at vera óheft.
- Hesi fáu orð, tí í serfrøðingaheimi tygara tykist eitt nógv vert alternativ at vera burturgloymt: **Nevniliga alternativið, ið helst hevur ein stóran meiriluta av føroyingum aftanfyri seg. Við einari góðari ríkisrættarligari loysn, ið ikki fremur hóttafall ella búskaparligan skelk í Føroyum.**
- Harra J. Mørkøre: Tað er ein seriørur flokkur, ið eitur Sambandsflokkurin. Tygara trúvirði tekur skaða, um hesin flokkur verður »gloymdur«. Vit eru mong í spyrja, um ein serfrøðingur bert sær við einum eyga. Um onkur serfrøðingur er, ið hevur hendan trupulleika, eigur tað at vera upplýst.



*Marjus Dam, løgtingsmaður*

Vinarliga
**Marjus Dam,**
**løgtingsmaður**

# Eidesgaard — jarnbrotið hjá Nyrup!

*"Eg skal vera eitt føroyskt jarnbrot" segði Jóannes Eidesgaard áðrenn fólkatingsvalið. Men nú tykist hann vera meira trúgvur móti sínum danska flokki, enn móti føroyskum myndugleikum. Sjálvt tá Nyrup brýtur eina avtalu við landsstýrið, fær hann stuðul frá formanni Javnaðarfloksins. Spurningurin er nú, hvør brúkar hetta "føroyska jarnbrotið"?*

Í 1998 gjørdu landsstýrið og stjórnin eina avtalu. Hon segði m.a., at partarnir skuldu taka upp samráðingar um eina búskaparliga skiftisskipan í sambandi við, at Føroyar gjørdust sjálvstøðugt land.

Landsstýrið fyrireikaði seg til hesar samráðingar í tvey ár. Men tá samráðingarnar skulu byrja, leyp stjórnin frá avtaluni.

Aftur og aftur boðaði forsætisráðharrin frá, at hann noktar at samráðast um nakra skiftistíð. Hann vildi als ikki tosa um tað. Tað er fýra ár ella einki.

Harvið hevur stjórnin brotið eina avtalu, sum hon hevur gjørt við Føroya Landsstýri. Eingin sum helst ivi er um tað. Tá tú fyrst avtalar at taka upp samráðingar um eitt mál, og síðani noktar so mikið sum at tosa um málið, so hevur tú brotið avtaluna!

### Eitt krav frá øllum

Øll taka ikki undir við, at Føroyar skulu hava fullveldi. Øll eru ikki samd um, at vit skulu hava nakra skiftistíð. Og summi ynskja, at skiftistíðin verður stutt, tí tey halda at tað kann forða fyri, at vit gerast eitt sjálvstøðugt land. Hetta eru politiskar meiningar, og teimum hava øll rætt at virka fyri.

Men hetta hevur einki við avtalubrotið at gera. Uttan mun til hvat vit halda um fullveldisætlanina, so eiga vit at krevja, at stjórnin virðir landsstýrið so frægt, at hon heldur gjørdar avtalur. Uttan mun til hvørjum fótbóltsliði vit halda við, so mugu vit semjast um, at reglarnar skulu haldast, tá dystir verða spældir. Annars verður einki skil í. Soleiðis er eisini í politikki. Reglarnar mugu fylgjast og avtalur mugu haldast!

Og tað eru kanska serliga tey, sum ynskja at danska statsvaldið eisini framyvir skal vera hægsti myndugleiki í Føroyum, sum mugu krevja, at stjórnin heldur sínar avtalur. Tí fremsta treyt fyri at vit kunnu liva undir fremmandum statsvaldi er sjálvsagt, at hetta statsvald virðir teir myndugleikar, vit velja at umboða okkum. Tí má tað vera eitt krav frá øllum føroyingum, at stjórnin virðir landsstýrið. Eisini tá landsstýrið ikki umboðar júst okkara ynski.

Tað kann væl verða, at samráðingarnar um skiftistíðina høvdu endað við, at hon bleiv nærri fýra enn fimtan árum. Men tað má spælast eftir reglunum! Tá samráðingar eru avtalaðar, so eiga samráðingar at vera! Hetta má vera eitt krav frá øllum, uttan mun til politiskan lit og ynski. Góðtaka vit at reglarnar verða brotnar tá tað tænir okkara politisku málum, flyta vit okkum burtur frá grundleggjandi, demokratiskum hugburði.

Og ein av teimum, sum hevur flutt seg ræðandi langt burtur frá slíkum hugburði, er formaður Javnaðarfoksins, Jóannes Eidesgaard.

### Flokkin ella landið

Áðrenn Jóannes Eidesgaard bleiv valdur til fólkatingið, gav hann veljarunum greið lyfti: Hann skuldi ikki bara umboða móðurflokkin hjá sær, Socialdemokratiet. Nei, hann skuldi fyrst og fremst umboða Føroyar og føroysk áhugamál. Hann skuldi vera ein føroysk rødd. Hann kallaði enntá seg sjálvan eitt *føroyskt jarnbrot* á fólkatingi. Veljarin beit á, og valdi tað føroyska jarnbrotið á danating.

Eftir valið valdi Jóannes kortini at stuðla Nyrupstjórnini. Hann gjørdist enntá tann avgerandi atkvøðan, og fekk harvið ómetaliga stórt vald. Tað "føroyska" jarnbrotið bleiv stungið mitt niður ímillum andstøðu og samgongu á fólkatingi, og kundi flyta báðar partar sín veg. Harvið fekk Jóannes Eidesgaard framúr góðar møguleikar fyri at røkja tað, hann var valdur at røkja: Føroysk áhugamál.

Nú hendir so tað, at stjórnin, sum hevur Jóannes Eidesgaard sum tann avgerandi stuðulin, brýtur eina avtalu, sum hon hevur gjørt við føroyskar myndugleikar. Støðan hjá Jóannesi í hesum máli skuldi verið púra greið. Hann lovaði áðrenn hann bleiv valdur, at hann skuldi røkja føroysk áhugamál. Hann lovaði, at tað vóru Føroyar og ikki Socialdemokratiet, sum stóðu honum fremst.

Nú stóð so valið millum hesi bæði. Tann socialdemokratiska stjórnin breyt eina avtalu, hon hevði gjørt við Føroya landsstýri. Jóannes Eidesgaard skuldi velja: Socialdemokratiet ella Føroyar.

Tá orðaskifti var á fólkatingi um samráðingarnar, fingu vit at vita, hvat Jóannes Eidesgaard hevði valt: Hann stuðlaði stjórnini fult og heilt. Hansara landsmenn fingu gor og gall; danska stjórnin tey søtastu orð.

Støðan hjá Jóannes Eidesgaard kann tí væl samanberast við eitt jarnbrot. Men hann er ikki nakað føroyskt jarnbrot. Hann er eitt jarnbrot í hondunum á Poul Nyrup Ramsussen. Nyrup brúkar hansara avgerandi stuðul til at fremja avtalubrot móti Føroya Landsstýrið.

### Ikki ein erlig søk

Jóannes Eidesgaard er ímóti tjóðarfrælsi. Tað er ein erlig søk. Hann tekur undir við endamálinum hjá stjórnini sum er, at Føroyar skulu verða verandi undir donskum valdi. Tað er ein erlig søk. Men hann góðtekur eisini at stjórnin, sum ein lið í royndunum at náa hesum endamáli, fremur avtalubrot.

Tað er ikki ein erlig søk.

Í fullveldissamráðingunum er Jóannes Eidesgaard í parti við donsku stjórnini. Tað er ein erlig søk. Men hann góðtekur eisini, at stjórnin brýtur grundleggjandi demokratiskar reglar. Góðtekur, at hægsti myndugleiki føroyinga undir verandi skipan ikki verður virdur.

Tað er ikki ein erlig søk.

Sum allir aðrir javnaðarmenn á fólkatingi, stuðlar Jóannes Socialdemokratinum. Tað er ein erlig søk. Men tá leiðarin fyri Socialdemokratiet brýtur eina avtalu við føroyskar myndugleikar, má hann velja, hvørjum hann skal vera loyalur ímóti. Sínum flokki ella sínum heimlandi. Og tá Jóannes skuldi velja millum flokkin og sítt egna land, fall valið á Socialdemokratiet.

Tað er heldur ikki ein erlig søk.

### Eitt jarnbrot kann brúkast til so mangt

Herfyri var orðaskifti um løgmansrøðuna. Tá hoyrdi Føroya fólk Jóannes Eidesgaard gera gjøldur burturúr avtaluni, sum er brotin. "Tit vóru sjálvir úti um tað. Tit kundu bara gjørt eina betri avtalu", gottaði hetta "føroyska" jarnbrotið sær...!

Mong av teimum, sum hava stýðjað Javnaðarflokkin, øtast av hesi framferð.

Tað er skelkandi at Jóannes Eidesgaard góðtekur avtalubrot - og stuðlar avtalubroti - bert tí tað tænir hansara politisku endamálum. Og tað er skelkandi at hann ikki heldur tey lyfti hann gav, áðrenn hann varð valdur í fólkatingið. Tí hann setir jú ikki Føroyar fremst. Hann tekur, sum ein av limum floksins segði herfyri, flokkin fram um landið. Hann tekur Socialdemokratiet fram um Føroyar. Og hetta ger hann, sjálvt tá leiðarin fyri Socialdemokratiet brýtur eina avtalu við Føroya Landsstýri.

Men eitt jarnbrot er jú eisini eitt amboð, sum verður brúkt av tí, sum heldur í tí. Tað glintar og kann fáa nógv buldur í, tá klettar verða fluttir. Men jarnbrotið ger ikki av, um klettarnir verða fluttir fyri at sleppa undan forðingum, ella um teir verða lagdir sum ein forðing. Eitt jarnbrot hevur onga meining sjálvt. Tað er vansin við at vera jarnbrot.

Jóannes hevur fleiri ferðir verið firtin, tá onkur hevur kravt, at hann nú má taka støðu og siga hvørjum parti hann er í. Hann hevur ákært slík fyri at leggja seg undir at fremja landasvik, hóast hetta orðið ongantíð hevur verið brúkt uttan av honum sjálvum. Orðatakið sigur: "Sekur er hann ið at sær tekur." Serliga gerst hetta sjónskt tá so langt er ímillum givin vallyfti og politiskar gerðir, sum hjá "jarnbrotinum Jóannesi Eidesgaard".

**Kai Vágfjall**



Orðaskifti:

# »Vit takka Margretu fyri tíðina...«

*- leiðin úr avskeplaðum heimastýri til nýggja frælsa stjórnarskipan*

Undir viðgerðini av løgmansrøðuni herfyri var tað fyrst og fremst sjálvstýrisuppskotið hjá Javnaðarflokkinum, sum kom at standa í brennideplinum. Út frá teirri sannroynd — sum eisini var staðfest av samgongutingmonnum — at landsstýrið hevur rent seg fast við fullveldisætlanini, veksur áhugin frá øllum síðum fyri tí alternativa uppskotinum til at skipa Føroyar sum frælsa tjóð, sum Javnaðarflokkurin vísir á.



*Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður*

### Sjálvstýrislógin tekur allar avmarkingar burtur

Tað er ikki meir enn hálvtannað ár síðani, at Høgni, varaløgmaður, og aðrir loysingarmenn, háðandi skírdu sjálvstýrisuppskotið hjá Javnaðarflokkinum fupp og svindil, meðan teirra egna projekt um fullveldið enn lá feskt og vónríkt á skriviborðinum. Mangt er broytt síðani tá. Fullveldisætlanin hevur mist alt trúðvirði, undirtøkan í fólkinum er minkað niður í ein lítlan minniluta, og millum landsstýrisflokkar og í landsstýrisflokkum valdar mistrúgv.

Hinvegin stendur nú uppskotið hjá Javnaðarflokkinum til nýggja sjálvstýrislóg alt meira sum tann gongda leiðin burtur úr einum avskeplaðum heimastýri til eina nýggja frælsa stjórnarskipan. Sjálvstýrislógin tekur allar avmarkingar fyri veruligum sjálvstýri burtur, so at vit kunnu økja okkara sjálvstýri frá partvísum til fullfíggjað sjálvstýri, so hvørt sum vit skapa búskaparligu og samfelagsligu fortreytirnar.

### Nýtt heimastýri loysir ongar trupulleikar

Tí gongur uppskotið hjá Javnaðarflokkinum ikki út uppá at seta eina nýggja heimastýrisskipan ístaðin fyri ta gomlu. Trupulleikin við eini heimastýrisskipan er júst tann, at hon ikki gevur veruligt sjálvstýri - hon gevur ikki føroyskum myndugleikum ta fullu ábyrgdina og tað fulla ræði á egnum viðurskiftum.

Tey skendskastu dømini um hetta var tann eyðmýkjandi avmakt, sum føroyskir myndugleikar komu at standa við fyrst í nítiárunum, tá teir vóru tiknir við brókunum niðri á øklunum og tvingaðir at seta harðrendar og grundbroytandi kreppuloysnir í verk, sum aðrir høvdu lagt til rættis.

Eitt annað dømi um tey avskeplaðu viðurskifti undir heimastýrisskipanini, sum koma føroysku tjóðini í eina mannminkandi støðu, er nú føroyska málið við einum altjóða sáttmála lýsir verður lýst sum eitt landspartamál hjá einum tjóðskaparligum minniluta!

### Nýggjur sáttmáli millum javnbjóðis partar

Tí kann ikki verða talan um bert at seta eina nýggja heimastýrisskipan í verk — tað krevjast grundleggjandi broytingar í stjórnarviðurskiftunum, sum geva føroyskum myndugleikum ta fullu ábyrgdina og tað fulla ræði á egnum viðurskiftum.

Hetta er vorðið neyðugt fyri eina framhaldandi politiska, búskaparliga og samfelagsliga menning í Føroyum.

Við sjálvstýrislógini verður settur ein nýggjur sáttmáli í gildi millum Føroyar og Danmark, sum tekur heimastýrislógina av og umskipar viðurskiftini millum londini til ein felagsskap millum javnbjóðis partar í ríkinum.

### Føroyskt sjálvræði tryggjað altjóðarættarliga

Hesin nýggi sáttmáli um ríkisfelagsskapin millum javnlíkar tjóðir verður lýstur fyri altjóða samfelagnum, so at hann fær altjóðarættarligt gildi. Á henda hátt verður føroyski tjóðarmyndugleikin tryggjaður fult so høgt sum á grundlógarstigi. Júst við tí at sáttmálin fær altjóðarættarligt gildi, tryggja vit okkum ímóti, at danskir ella nakrir aðrir myndugleikar kunnu gera seg inn á tann fulla og óavmarkaða sjálvsavgerðarrættin, sum vit sambært sáttmálanum skulu hava yvir øllum viðurskiftum undir føroyskum løggávuvaldi.

### Sjálvstýrislógin loysir høvuðsmálini

Tað eru tvey altavgerandi mál at vinna við hesi mannagongd í sjálvstýrismálinum, sum sjálvstýrislógin leggur upp til:

- Fyri tað fyrsta er hetta einasti mátin at fáa eina so breiða semju í sjálvstýrismálinum, bæði í fólkinum og í tinginum, sum er neyðug fyri at øll kunnu kenna seg trygg við og medvirka til tær stóru broytingar, sum skulu til fyri at Føroyar kunnu koma at standa á egnum beinum.

Aðrir møguleikar eru ikki realistiskir: øðrumegin liggur tann kollsiglda fullveldisætlanin, og hinumegin fær ein sambandsloysn hvørki tingið ella fólkið við sær, tí so stór er framdriftin í sjálvstýrismálinum tó hóast alt.

- Fyri tað næsta fáa vit loyst sjálvt høvuðsmálið í sjálvstýrisspurninginum: at vinna føroyskum myndugleikum hægsta vald og fulla ábyrgd í egnum viðurskiftum. Hetta verður ikki gjørt sum landsstýrið ætlar í einum lopi við eini loysing — m. a. av teirri einfaldu orsøk at tær neyðugu búskaparligu og fyrisitingarligu fortreytirnar rætt og slætt ikki eru til staðar. Hetta verður heldur ikki gjørt við at skjóta sjálvstýri langt fram í tíðina og bara bíða inntil einaferð allar fortreytir verða til staðar.

Nei, vit fara til verka nú og fáa okkum við sjálvstýrislógini fult ræði — kalla tað hægsta vald, kalla tað evsta vald, kalla tað suverenitet - á øllum teimum málsøkjum, sum longu ídag eru yvirtikin. Síðani leggja vit øll hini málsøkini, sum enn eru ríkismál, undir føroyska løggávu, eitt fyri og annað eftir. Og vit taka sjálvsagt eisini tað fíggjarligu ábyrgdina við. Soleiðis taka vit veruliga ábyrgd uppá okkum, so hvørt vit eru før fyri at lyfta hana, politiskt, fyrisitingarliga og fíggjarliga, mál fyri mál. Og soleiðis verður eitt partvíst sjálvstýri til eitt fullfíggjað sjálvstýri.

### "og eitt kunningarskriv til tann Nyrup, ið tá situr..."

Tá eru vit komin hartil, at allar fortreytirnar eru skaptar fyri einum veruliga fríum vali, har vit uttan ampa kunnu avgera, um vit skulu taka tað síðsta stigið, at loysa og fara út úr ríkisfelagsskapinum.

Sum ein partamaður í Norðstreymi hevur tikið til: "Alt í alt ein greið og virðilig prosess. Og táið hon er at enda komin — um tað gongur av tí besta um eini 10 ár, og um tað gongst verri, so seinni — so kunnu vit halda fólkaatkvøðu um loysing ella samband. Verður meiriluti fyri loysing, ja so senda vit bræv til Margretu og takka fyri tíðina og eitt kunningarskriv til tann Nyrup, ið tá situr, um at vit hava tikið loysing."

Tað er eisini meira stílur yvir eini slíkari framferð. Og so sleppur man undan hesum skammiliga, sum nú fer fram, har man júkar og biddar um skiftisskipanir og skiftistíð til eina loysing, sum man kortini ikki heldur seg hava ráð ella førleika ella dirvi til at taka.

**Hans Pauli Strøm,**
**løgtingsmaður**

# Vinnulig gagnnýtsla av alnetinum

Seinastu árini er alnetið, heimasíða og teldupostur vorðið ein partur av gerandisdegnum hjá nógvum føroyskum fyritøkum. Flestu eru greið um mongu møguleikarnar, henda tøknin førir við sær, men fáar fyritøkur hava til fulnar megnað at gagnnýtt teir rakstrarligu fyrimunirnar, sum digitalisering og alnetið hava við sær.

E-business, ella e-vinna, er felagsheiti fyri teir møguleikar, sum fyritøkan hevur, tá umræður vinnuliga gagnnýtslu av alnetinum. Her er ikki bert talan um keyp og sølu á alnetinum, ella e-handil, men eisini um samskifti sum heild við viðskiftafólk, veitarar, almennar stovnar, starvsfólk osfr. Gongdin uttanlands er, at fyritøkur, sum til fulnar megna at gagnnýta vinnuligu møguleikarnar við digitalisering og alnetinum, vinna sær betri kappingarføri. Samskiftið gerst effektivari og viðskiftafólk merkja eina betri tænastu, samstundis sum fyritøkan fær rakstrarligar fyrimunir. So sum so eru møguleikarnr viðkomandi fyri allar fyritøkur, sum vilja tryggja sær framtíðar kappingarføri, og hetta er eitt mál, sum leiðslan á einstøku fyritøkunum eigur at taka støðu til.

TK Stovan skipar fríggjadagin 1. september fyri kunningarfundi um e-business undir heitinum **»E-business - viðkemur øllum fyritøkum«.**

Kunningarfundurin er í tveimum pørtum. Í fyrra partinum verður framløga um e-business í síni heild, og í seinna partinum eru fýra styttri innlegg um meira ítøkilig evnir, sum eru partar av e-business.

Fyrsti røðarin verður danski konsulenturin, rithøvundurin og »kveikjarin« Jesper Bove-Nielsen. Hann fer at hugleiða, kveikja og kunna um digitalisering, e-business og um altjóða gongdina. Eisini fer hann at vísa á, hví e-business fyrst og fremst er ein strategiskur leiðsluspurningur, og ikki bert ein teknisk uppgáva hjá fyritøkuni. (Bókin hjá Jesper Bove-Nielsen »E-Business« kann lesast á www.digitalestrategier.dk og kann annars keypast frá forlagnum Børsen).

Í seinna partinum verða fýra innlegg:

Ráðgevin Preben Bach frá TIC Århus fer at greiða frá, hvussu fyritøkur fáa ráðgeving og kunning, soleiðis at tær betur kunnu fyrireika seg til e-busines.

Niels Chr. Nolsøe, stjóri á Elektron, greiðir m.a. frá arbeiðinum við at fáa toll og avgjøld avgreidd yvir alnetið, og hvussu hetta arbeiðið líður. Somuleiðis fer hann at greiða frá ymsum nýggjum, sum hendir í Føroyum júst nú innan e-business.

Linda Gunnlaugsdóttir, sum er nýggi stjórin á Eimskip Føroyar, fer at greiða frá, hvussu tey brynja seg út til ta nýggju e-verðina. Eimskip ætlar at minka um fjarstøðuna millum keypara og seljara, og málið er at verða besti »útberari« av smápakkum í norðurhøvum um 3 ár. (Logistikkur og forwarding).

Fróði Magnussen frá Formula.fo fer at lýsa tann partin av e-handli, sum víkur flutningi av kunning og peningi (mótsatt fysiskum flutningi). Her verður dentur lagdur á at greiða frá, hvat skal til, tá slíkar loysnir skulu fremjast, bæði av útvegara og keypara. Umframt hetta verður ein stutt frágreiðing um tann tekniska partin og kostnaðarstøðið (modul-uppbygging).

Kunningarfundurin verður á Hotel Føroyum fríggjadagin 1. september kl. 13.00.